## Lucio til Inter

Harvið struku italiumenn við brasiliumanninum beint frammanfyri nøsini á onglendingum. Manchester City hevur nevniliga dyrgt dúgliga eftir verjuleikaranum, men Lucio valdi italsku meistararnar framum mongu milliónirnar í Manchester City. 31 ára gamla Lucio hevur skrivað undir ein fimm ára langan sáttmála við liðið hjá Mourinho, sum flytir til Inter frá týska Bayern München.



## Framtíðin hjá Høgna ógreið

Tað er framvegis ógreitt, hvar framtíðin hjá Høgna Madsen liggur. Fyrr í vikuni vistu fjølmiðlar at siga, at hann var givin í NSÍ. Hetta varð seinni avsannað av formanninum í NSÍ. Hann gjørdi greitt, at leikarin og felagið samráddust um framtíðina hjá leikarinum, og at ein niðurstøða skuldi koma seinni. Fyrrapartin í dag visti formaðurin Andrias Lamhauge framvegis ikki at siga, hvussu bleiv við samstarvinum við Høgna Madsen.



# Finalan verður í Havn á ólavsøku

**Forsetin í Fótbóltssambandinum er ivaleysur. – Finalan verður spæld í Havn á ólavsøku, sigur hann, og skírir tað vera natúrligar rembingar, ið nú eru**

FÓTBÓLTUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Høgni í Stórustovu, forseti í Fótbóltssambandinum, viðgongur, at tey arbeiða við málinum, um inntøkubýtið av steypafinaluni á ólavsøku.

– Tað eru nakrar natúrligar rembingar, sum eru undan einum slíkum dysti, men hetta finna vit út av, og tað er heilt víst, at finalan verður spæld í Havn á ólavsøku, sigur Høgni í Stórustovu.

Hann vísir á, at aftanfyri bæði ólavsøkudystirnar og steypafinaluna, eru langar søgur og siðvenjur.

– Við at flyta ein slíkan dyst eru onkrar broytingar í mun til undanfarin ár, greiðir Høgni í Stórustovu frá, sum kortini ikki ivast í, at trupulleikin verður loystur.

### Fáorðaðir formenn

Rólant Højsted, formaður í EB/Streymi, og Páll Gregersen, formaður í Víkingi, hava ikki tær stóru viðmerkingarnar, tá hesir verða spurdir eftir.

Báðir viðganga tó, at har eru onkur viðurskifti kring inntøkubýtið, sum teir kundu hugsað sær øðrvísi, men at teir vænta, at Fótbóltssambandið fær loyst málið.

Annars sigur Páll Gregersen, at hann ikki sær nakrar stóran trupulleika í hesum. Hann ger greitt, at sjálvandi ynskja tey í Víkingi, at finalan í kappingini um løgmanssteypið verður spæld í Havn á ólavsøku, og sjálvsagt skulu havnarfeløgini eisini fáa eina ávísa upphædd burtur úr hesum dystinum.

**Finalan verður spæld í Havn á ólavsøku**
savnsmynd

Ólavsøkudysturin:

# Frá stórdysti til venjingardyst uttan týdning

**Ólavsøkudysturin flutti seg frá at vera ein stórdystur millum havnarfeløgini bæði, til týdningarleysan venjingardyst. Nú er steypafinalan í ólavsøku í vanda**

FÓTBÓLTUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Fram til 1991 var ólavsøkudysturin eins fastgrógvin partur av ólavsøkuni, sum kappróður og candyfloss. Talan var um steypadyst, sum lokkaði nógv fólk í Gundadal. Ólavsøkudysturin var tá ein av stóru dystunum hjá havnarfeløgunum, men dysturin var hvørki partur av landsella steypakapping.

Dysturin var eisini til eftir 1991, men føroysk altjóða luttøka og seinni eisini ein meira komprimerað landskapping bóru við sær, at áhugin fyri dystinum minkaði, soleiðis at hesin nú meira varð roknaður sum ein týdningarleysur venjingardystur.

### Steypafinala og endurgjald

Í 2000 varð steypafinalan spæld á ólavsøku. Í hesum sambandi gjørdi Fótbóltssambandið avtalu við havnarfeløgini bæði – HB og B36 – um, at hesi skuldu fáa eina ávísa upphædd í endurgjald frá Fótbóltssambandinum fyri mista inntøku, sum tey annars høvdu havt, um tey sluppu at fyriskipa vanliga ólavsøkudysti teirra.

Til og við ólavsøku 2005, varð finalan í kappingini um løgmanssteypið spæld á ólavsøku. Hvørja ólavsøku fingu havnarfeløgini endurgjald frá Fótbóltssambandinum fyri mistar inntøkur, tey annars kundu havt á ólavsøku.

Seinastu trý árini hevur finalan verið avgreidd eftir ólavsøku. Í 2006 var eitt leikaraloyvið – ella mangul upp á tað sama – orsøk til, at semifinalurnar ikki vóru avgreiddar til tíðina, og finalan harvið varð útsett til eftir ólavsøku.

Í 2007 og 2008 varð finalan spæld um heysti. Partvíst tí, at kappingin var umløgd og partvíst tí, at luttøkan hjá feløgunum í altjóða fótbólti møguliga kundi liggja sama dag sum steypafinalan, um henda varð spæld á ólavsøku.

Hesi trý árini fingu havnarfeløgini einki endurgjald frá Fótbóltssambandinum.

### 2009 er øðrvísi

Tað fáa HB og B36 hinvegin í ár. Sum skilst hevur Fótbóltssambandið gjørt eina avtalu við havnarfeløgini bæði um, at tey aftur í ár fáa eina kompensatión fyri mistar inntøkur av ólavsøkudystinum.

Einum dysti, sum helst ikki hevði verið spældur, tá bæði HB og B36 skulu spæla landskappingardystir 26. juli og longu aftur 2. august. Í besta føri hevði verið talan um ein týdningarleysan venjingardyst, sum ikki hevur nakran serligan áhuga millum manna.

Harvið fáa havnarfeløgini endurgjald fyri ein dyst, sum annaðhvørt ikki hevði verið spældur ella hevði kastað ógvuliga lítið av sær fíggjarliga.